

*Ovurfegnir nólsoyingar, sum nú liggja javnir í stigum við Havnarbátin í kappingini um at gerast føroyameistarar 2004*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# So varð javnt

Í einum sera spennandi tíggjumannafarsróðri á Fjarðastevnu øktist spenningurin um føroyameistaraheitið bara enn meira. Havnarbáturin, sum hevði fýra stig meira enn Nólsoyingur, endaði á fjórða plássinum, meðan nólsoyingar vunnu. Nú eru teir so javnir í stigum.

Róðurin hjá tíggjumannaførunum er annars altíð spennandi. Og upp aftur tættari er tað altíð millum bátarnar, tá róð verður á 1.000 metrum. Soleiðis var eisini á Fjarðastevnu.

Vágbingur, sum vann á heimasjógvi, vikuna áðrenn, fekk besta startin. Men Nólsoyingur og Eysturoyingur vóru væl við. Eisini Havnarbáturin.

Hesir togaðust aftur og fram undir róðrinum, men tað tóktist tó einu løtuna sum, at Nólsoyingur fór at fara frá hinum. Inntil Havnarbáturin svaraði aftur. Teir løgdu seg á odda stutt áðrenn endaspurtin, men fingu harða kapping í sjálvum spurtinum. So harða, at teir endaðu afturi á fjórðaplássinum, tá samanumkom.

Nólsoyingur dró longsta stráið, og Eysturoyingur kom við einum sera góðum endaspurti inn sum nummar tvey. Vágbingur, sum byrjaði so væl, mátti sostatt taka til takkar við einum triðjaplássi. Fýra teir fremstu bátarnir komu á mál innan fyri eitt sekund, so tættari kundi tað neyvan verðið.

Tað var avbera gott fyri Nólsoying, at Havnarbáturin ikki megnaði at fáa meira enn trý stig, tí við teirra sjey stigum, bleiv javnleikur millum teir báðar bátarnar. Sostatt er lagt upp til eina sera spennandi og tætta kapping í tíggjumannaførunum tað, sum eftir er av kappingarárinum.

**- sae -**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Nólsoyingurin | 04.38.08 |
| 2 | Eysturoyingur | 04.38.16 |
| 3 | Vágbingur | 04.39.07 |
| 4 | Havnarbáturin | 04.39.09 |
| 5 | Vestmenningur | 04.41.21 |
| 6 | Skálabáturin | 04.43.20 |
| 7 | Hoyvíkingur | 04.45.00 |

## Gott fyri Ólavsøkuna




Magni Brøðraberg, bátsformaður á Havnarbátinum, var vónbrotin eftir róðurin. Men hann dugdi tó ikki at seta fingurin á júst hvat gekk galið hjá Havnarbátinum í Vestmanna.

– Tað var ikki so heilt galið hjá okkum. Vit lógu nummar trý inntil sjálvan endaspurtin, og soleiðis sum róðursmaðurin hjá okkum rópti, so helt eg, at tað kanska fór at ganga, greiðir hann frá.

Magni heldur tó ikki, at her beinleiðis er nakar vandi á ferð. Hann fegnast heldur um, at kappingin er so hørð og spennandi.

– Her er ongin munur millum teir fremstu bátarnar, so her kann alt henda enn, heldur hann fyri.

Hóast Havnarbáturin endaði á fjórðaplássinum hesuferð, so fara teir at halda fram við teirra skrá og øllum tilrættisleggingum fyri árið.

– Nú er tað spennandi, og hetta ger bara Ólavsøkuna enn betur, sigur Magni Brøðraberg.

**- sae -**







*Eins og hjá gentunum komu fýra tíggjumannaför eisini sera jøvn um málstrikuna á Fjarðastevnuni*

*Myndir: Álvur Haraldsen*



# Sundabáturin luktar gullið nú

Hóast ivasama byrjan aðru ferð startdómarin skeyt róðurin hjá seksmannaførunum í gongd, so megnaði Sundabáturin at vinna róðurin í Vestmanna leygardagin.

Og sum hinar ferðirnar, tá teir hava vunnið, var rómurin øgiligur á kaiini av viðhaldsfólkunum, sum vóru komin at síggja róðurin.

Seksmannaførini við monnum startaðu tvær ferðir á Fjarðastevnu, tí nakrir bátar loystu seg úr fasta startinum, áðrenn dómarin skeyt róðurin í gongd. Hetta verður nú mett at vera tjóvstartur, hóast bátarnir ikki byrja at rógva áðrenn skotið, og tí skjýtur dómarin av.

Í tí fyrra startinum fekk Sundabáturin ein góðan start, og ein av manningini sigur, at hann hevði ongan hug til at steðga, tá hann hoyrdi skotið, tí báturin gekk so væl. Men har var onki at gera. Bátarnir máttu steðga og byrja umaftur.

Aðru ferð gekk ikki so væl hjá Sundabátinum. Starturin var onki at reypa av, og tí gekk tað ein løta, áðrenn teir komu fyri seg. Men teir komu so líðandi fram, og hildu seg har – tó í harðari kapping við serliga Jarnbard.

Um hálvt málið byrjaði Jarnbardur at taka seg longur og longur fram, og tað endaði eisini við, at blái báturin úr Havn legði seg á odda.

Hetta mundi taka nakað av luftini frá fleiri av viðhaldsfólkunum hjá Sundabátinum, men sum onkur tók til, so er ein róður ikki yvirstaðin fyrr enn dómarin hevur skotið.

Á fleiri stevnum hevur Sundabáturin havt ein framúr endaspurt, og á Fjarðastevnu var tað onki undantak. Teir tóku seg longur og longur fram á Jarnbard, og komu framum. Tá avtornaði lógu teir nærum eina bátslongd frammanfyri.

Sum vera man var frøin stór, og tað var ein undarlig sjón at síggja fleiri av manningini reisa seg upp í sigursgleði, so skjótt sum skotið gekk av. Tí teir vóru nóg illa komnir upp á beinini, so duttu hesi undan teimum, og teir lógu skerflatir í bátinum.

Tað gekk so ein løta, og so komu teir uppaftur at standa og tá bar til.

Við rópum og sangi varð Sundabáturin drigin upp og borin upp um høvd, og har skortaðu ikki hendur at taka í.

Sundabáturin liggur nú sjey stig framman fyri Jarnbard í kappingini um at gerast føroyameistari, so tann veruligi spenningurin framyvir man fara at vera, hvør fer at vinna tær báðar komandi stevnurnar.

**- sae -**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Sundabáturin | 05.18.04 |
| 2 | Jarnbardur | 05.20.15 |
| 3 | Gongurólvur | 05.21.23 |
| 4 | Strálan | 05.23.00 |
| 5 | Víkingur | 05.26.00 |
| 6 | Hósvíkingur | 05.26.10 |
| 7 | Sølmundur | 05.28.21 |
| 8 | Lómur | 05.31.06 |
| 9 | Hvessingur | 05.38.11 |
| 10 | Sandingur | 05.39.09 |
| 11 | Smyril | 05.45.22 |



*Sundabáturin hevði stóran fjepparaskarða við á Fjarðastevnu, og varð báturin lyftur upp um høvd í sigursrúsinum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Ivaðist ikki



Róðursmaðurin á Sundabátinum, Martin Simonsen, var ikki í iva um, at teir høvdu vunnið, tá skotið brast á Fjarðastevnu. Ovurfegnir royndu rógvararnir at reisa seg, men so nógv høvdu teir givið í endaspurtinum, at beinini fóru undan teimum.

Martin viðgongur beinanvegin, at start- og endaspurturin hjá teimum er teirra styrki.

– Vit eru ikki so góðir í miðróðrinum, men alt hitt er gott, og tað var tíbetur nóg mikið til at vinna í dag, sigur hann stórsmílandi.

Hann greiðir frá, at starturin hjá teimum fyrru ferð hendan dagin var nógv betur, meðan tann seinni ikki eydnaðist so væl. Men tað legði manningin líka í, tí tá endaspurturin var av, var ongin ivi um, hvør hevði vunnið.

Martin sigur, at teir fara at halda fram at venja, sum teir higartil hava. Teir gleða seg eisini til at fara til Sørvágs aftur at rógva 1.500 metrar, tí tað er harðari at rógva tann stytra teinin.

Hóast onki er endaliga avgjørt enn, so viðgongur Martin, at okkurt skal ganga heilt galið, um teir norðan úr Sundi og Norðdepli ikki skulu gerast meistarar í ár.

**- sae -**

## Vónbrot



Oddur Olsen er róðursmaður á Nevinum Reyða. Hann dylir ikki fyri, at hann veruliga trúði, at teir fóru at vinna á Fjarðastevnu.

– Eg hevði okkum at vera fremstir frá umleið 400 metrum. Fekk tó ikki mett so væl um munin, men eg ivaðist ikki í, at vit vóru fremstir, sigur Oddur.

Eftir at hava ligið so longi framman fyri Argjabátin, sum hevur verið suverenur higartil í ár, var tað eitt stórt vónbrot fyri manningina og róðursmann at síggja reyða bátin av Argjum fara fram um í teimum allarseinastu tøkunum.

Oddur sigur, at hóast munurin var so lítil, sum hann næstan kundi vera, so var hann bangin fyri, at Argjabáturin var farin framum, tá skotið gekk.

– Tað loysir seg nú ikki at dvølja við hetta tapið. Vit hava gjørt framgongd, og eg haldi, at tað koyrir rímuliga væl hjá okkum í løtuni, hóast tað heldur ikki hesuferð rakk til eitt fremstapláss, sigur Oddur Olsen. Og við einum skeivum smíli leggur hann afturat, at næstu ferð verður tað Nevið Reyða, sum vinnur.

Á Vestanstevnu, sum verður í Sørvági, skal aftur rógvast á teimum longru teinunum eisini. Bæði 1.500 og 2.000 metra málini verða rógvin har, og tað gleða Oddur og hansara manning seg til.

– Okkum dámar betur at rógva á 1.500, so nú er bara at venja nokk til komandi leygardag, sigur Oddur Olsen, róðursmaður á Nevinum Reyða.

# Argjabáturin fekk harða kapping

Manningin á Nevinum Reyða er í ferð við at gera spádómarnar um, at ongin fer at taka Argjabátin til skammar. Fyrst góvu teir Argjabátinum harða kapping á Jóansøku í Vági og aftur á Fjarðastevnu var tað líka við, at klaksvíkingarnir tóku Argjabátin.

Argjabáturin byrjaði tó best og legði seg fram um í sjálvum startinum. Men sum í øllum hinum róðrunum kom Kvívíkingur sterkt aftur og legði seg fremst.

Tá gott helvtin var rógvið, hevði Argjabáturin tó tikið Kvívíking aftur. Og tá byrjaði Nevið Reyða úr Klaksvík at ganga væl. Teir tóku seg longur og longur fram, og beint áðrenn endaspurtin vóru teir meira enn hálva bátslongd á odda.

Hetta helt tó ikki til endan, tí í teimum allarseinastu tøkunum, fór reyði báturin av Argjum framum, og eydnaðist tað tí heldur ikki hesuferð at steðga sigursrøðini hjá Argjabátinum, sum nú næstan 100 % sikkurt kunnu kalla seg føroyameistarar.

Komandi vikuskifti verður kappróður í Sørvági, og tá fara áttamannaførini aftur at rógva á 1.500 metrum fyri seinastu ferð í ár. Um tað fer at broyta nakað upp á úrslitini, kann bara tíðin vísa.

**- sae -**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Argjabáturin | 05.02.10 |
| 2 | Nevið Reyða | 05:03.07 |
| 3 | Kvívíkingur | 05.06.13 |
| 4 | Ørvur | 05.07.23 |
| 5 | Knørrur | 05.14.04 |
| 6 | Miðvingur | 05.16.03 |
| 7 | Tofta Regin | 05.23.07 |



*Argjamenn høvdu enn størri orsøk til at fegnast um sigurin á Fjarðastevnu, tí hendan dagin kundi tað tað sama havt verðið klaksvíkingarnir umborð á Nevinum Reyða, sum vunnu róðurin*

*Mynd: Álvur Haraldsen*